Vinnan

VINNUTÍÐINDI í Sosialinum fast hvønn týsdag – eisini aðrar dagar

# StatoilHydro herja á aftur á landgrunninum

**Samanlagda StatoilHydro telist millum heimsins størstu oljufeløg, og tað fer nú undir eina sera umfatandi seismiska kanningarætlan á føroyska landgrunninum, norðarlaga við markið. Rúni M. Hansen, stjóri dylur ikki fyri, at eydnast seismikkurin væl, so kann hetta enda við, at teir fara at bora ein brunn. Tá verða so helst eisini onnur oljufeløg boðin at vera við**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Rúni M. Hansen, stjóri hjá StatoilHydro í Føroyum váttar, at samanlagda felagið júst hevur fingið longt loyvi 11, sum er tað loyvið, ið liggur longst norðaliga á landgrunninum. Statoil hevur skotið nakað av 2D seismikki í hesum loyvinum fyrr, og felagið heldur, at økið er so mikið áhugavert, at nú verður meira framkomin 3D seismikkur skotin. Hetta er fyrstu ferð, at tað samanlagda StatoilHydro ger eina beinleiðis operatión í Føroyum.

Úrslitið av hesum arbeiði fyriliggur helst ikki fyrr enn um eitt ár ella so. Rúni M. Hansen sigur, at hepnast seismikkurin væl, so fer StatoilHydro at umhugsa at selja part av loyvinum til onnur oljufeløg, fyri harvið at spjaða váðan, um so er at farið verður at bora.

Statoil hevur gjørt avtalu við seismikkfelagið Western Geco og verður eitt av tess flaggskipum, Geco Eagle brúkt til arbeiðið. Skipið er nærum 100 metrar langt. Verður veðrið til vildar rokna tey við, at skipið verður á føroyskum øki í einar tveir mánaðir í summar. So sjálvt eftir eina heldur ivasama BP boring verður framvegis stórt virksemi á landgrunninum í næstu framtíð. Í fyrstu syftu seismikkur, sum tó er mest týðandi metingargrundarlagið undan eini boring.




## Duritaprospektið

Statoil fekk loyvi 11 í aðru útbjóðing og umsitur tað 100%. Hetta er annars júst tað økið, sum eisini av øðrum oljufeløgum og jarðfrøðingum hevur verið mett at vera eitt tað kanska mest áhugaverda. Tað var táverandi leiðandi jarðfrøðingurin hjá Saga Petroleum, Terje Hagevang, sum í dag arbeiðir hjá Geysir, ið samstarvar við Atlantic Petrolum á landgrunninum, sum úttalaði seg til Sosialin, at øki 11 goymir kanska tað mest áhugaverda og størsta prospektið, nevnt Durita á landgrunninum. Geysir søkti um hetta saman við Atlantic Petrolum í 2. útbjóðing, men tað var Statoil, sum fór við loyvinum. Nú hava hesi feløg eins og onnur so møguleikan at keypa seg inn í loyvi, um og tá StatoilHydro ger av,



*Geco Eagle, sum er eitt av teimum mest framkomnu seismikkskipunum fer í einar tveir mánaðir í summar at skjóta seismikk á landgrunninum*
*Mynd StatoilHydro.*